Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 02. september 2005

COUNTRY DANSUR

Tann árligi Country Dansurin verður í ítróttarhøllini á Hálsi 24. september frá kl. 22

Bólkarnir ið spæla: Country Orkestrið
Twilight
Countrybólkurin úr Klaksvík

Forsølan av atgongumerkjum kring landið er byrja

STUÐLAFELAGIÐ HJÁ ARGJA BÓLTFELAG





**Fríggjadag 2. kl. 20.50**

**Clement Direkte**
Fríggjakvøld er hetta nýggja "late-night talkshowið" á skránni hjá Dr2. Sendingin bjóðar hyggjaranum eina blanding av seriøsum, kritiskum journalistikki og satiru. Roynt verður at koma eitt sindur út um tað kurteisliga markið. Verturin Clement Kjersgaard, ið er kendur frá røðini "Tal med Gud", tekur ímóti kendum dønum og altjóða stjørnum.

**Leygardag 3. kl. 19.45**

**Fótbóltur: Frakland - Foroyar**
SvF sendir beinleiðis frá dystinum, sum verður spældur í Lens í Fraklandi. Fraklendingar hava ryggin móti múrinum. Teir skulu fáa glið á aftur, tí higartil hevur teirra undankapping verið út av lagi vánalig. Um teir skulu sleppa við í endaspælið í Týsklandi, skulu teir vinna næstu dystirnar.

**Sunnudag 4. kl. 21.00**

**Pundik - frá krígsmanni til friðarstríðsmanni**
Tey á DR hava teknað eina vangamynd av fyrrverandi blaðstjóranum á Politiken, Herbert Pundik. Í 1948 stríddist hann í krígnum ímóti arabarunum. Í dag er hann ein iðin talsmaður fyri einum friði, sum í ein stóran mun tekur fyrilit til áhugamálini hjá palestinum. Sendingin hyggur m.a. afturá søguna hjá Pundik-familjuni.

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið